ítróttur

Nr. 72 • fríggjadagur • 16. apríl 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

Heini Hanusarson, landsliðsleikari:

Ótrúliga harmiligt

Ein av lyklaleikarunum á føroyska manslandsliðnum, Heini Hanusarson, heldur tað verða øgiliga spell, at samstarvið millum HSF og Lars Nedergaard er komið at enda

LANDSLIÐS-HONDBÓLTUR
Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Sterki høgri bakkurin á føroyska landsliðnum, Heini Hanusarson, var ógvuliga harmur um at hoyra, at Lars Nedergaard ikki longur er venjari hjá føroyska manslandsliðnum. Heini sigur, at honum hevur dámt Lars Nedergaard serstakliga væl sum venjara.

Kennir mentanina í Føroyum

Sjálvur heldur Heini Hanusarson, at tað hevur verið ein stórur fongur hjá føroyska hondbóltinum at hava Lars Nedergaard sum venjara, tí hann kemur útifrá, men kennir føroysku mentanina avlíkavæl. Við tað at Lars býr í Danmark, men samstundis hevur búð í Føroyum og virkað innan føroyskan hondbólt, hevur hann hollan kunnleika til munin á føroysku og donsku ítróttarmentanini, sigur Heini Hanusarson.

Lars Nedergaard hevur lagt stóran dent á kropsligu venjingina, og tað er nakað, sum Heini Hanusarson leingi hevur saknað í føroyskum hondbólti. Til dømis nevnir Heini Hanusarson við øll tey føroysku hondbóltsfeløgini og umrøtt kropsligu venjingina. Hetta er eitt øki, har vit eru langt aftan fyri okkara grannar, sigur Heini, og hann heldur, at umstøðurnar til júst kropsligu venjing halta í nógvum av føroysku feløgunum.

Somuleiðis heldur Heini Hanusarson, at tað er vert at hava í huga, at ein venjari sum Lars Nedergaard fær nógva inspiratión í Danmark, og at hann veruliga brennur fyri sakini. Lars hevur gingið inn fyri tí við lív og sál, sigur kollfirðingurin og leggur afturat, at hann dugir illa at síggja, at tað finst nakar venjari her á landi, ið kann geva landsliðnum eins nógv og Lars Nedergaard. Hann hevur verið ótrúliga seriøsur í mun til uppgávuna, heldur Heini Hanusarson.

Heini Hanusarson heldur tað vera stórt afturstig, at HSF nú fer at søkja eftir venjara í Føroyum

Neyvan slíkan venjarakapacitet í Føroyum

Í grein aðrastaðnis í blaðnum sigur formaðurin í HSF, Eivind Jacobsen, at nú verður farið at lýsa eftir nýggjum landsliðsvenjara, og at tað fyrst og fremst verður leitað í Føroyum. Hetta eru ikki tíðindir, ið hóva Heina Hanusarsyni, tí hann heldur ikki, at ein slíkur venjarakapacitetur sum Lars Nedergaard er at finna her á landi. Heini sigur, at eftir hansara tykki eru tað bert einir fýra ella fimm skikkaðir fyrstadeildarvenjarar í hondbólti, ið eru føroyingar. Um so er, at ein føroyingur verður settur sum landsliðsvenjari, heldur Heini Hanusarson, at tað er eitt hugskot, at HSF setur ein skikkaðan kropsligan venjara, ið skal verða tengdur at landsliðnum. Her hugsar Heini t.d. um vágbingin Magna Mohr, ið er kropsligur venjari hjá B36. Somuleiðis heldur Heini Hanusarson, at tað tykist eitt sindur løgið, at HSF fer í miðlarnar at lýsa eftir einum landsliðsvenjara, tí tá átti at verið talan um eitt starv, har HSF fór út at leita eftir honum, tí alternativini eru fá í Føroyum, og útlendskir hondbóltsvenjarar lesa neyvan føroysku bløðini, sigur Heini Hanusarson.

Sjálvur hevur kollfirðingurin leikt hetta seinasta hálvárið við Neistanum, eftir at hann hevði leikt eitt hálvt ár við TMS Ringsted í Danmark. Hann hevur bestu donsku deildini. Komandi summar gongur leiðin aftur til Danmarkar og Odense, har lesturin bíðar, men enn hevur Heini ikki tikið støðu til, hvar hann fer at leika, tá ið hann kemur niðuraftur. Heini sigur, at hann bíðar eftir at vita, um tað fer at eydnast TMS Ringsted at verða verandi í bestu deildini, tí so fer hann allarhelst aftur har at leika.

Lars Nedergaard ikki longur landsliðsvenjari

Hondbóltssamband Føroya hevur gjørt av at steðga samstarvið við danan Lars Nedergaard, og tískil verður í næstum lýst eftir nýggjum venjara til føroyska manslandsliðið

HONDBÓLTUR
Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Tað hevur leingi gingið sum slatur millum hondbóltsáhugaðar føroyingar, at Lars Nedergaard ikki fór at sita leingi sum landsliðsvenjari, og nú er tað so vorðið veruleiki. Eivind Jacobsen, formaður í hondbóltssambandinum, váttar, at avtalan millum HSF og Lars Nedergaard er strikað, og hann sigur tað verða fleiri orsøkir til tess.

Tað eru fyrst og fremst fíggjarkarmarnir, sum hava gjørt av, at leisturin í landsliðsarbeiðinum nú verður broyttur

Fíggjarkarmarnir avgerandi

Eivind Jacobsen sigur, at tað fyrst og fremst eru teir fíggjarligu karmarnir, ið hava gjørt, at sáttmálin millum HSF og Lars Nedergaard er strikaður. Millum annað var tað ógvuliga kostnaðarmikið, at danin ofta skuldi ferðast aftur og fram millum Føroyar og Danmark, umframt aðrar útreiðslur, ið fylgdu við. Tær samlaðu útreiðslurnar av at hava Lars Nedergaard sum venjara blivu ov høgar, sigur formaðurin í hondbóltssambandinum.

Gjørt eitt gott arbeiði

Tað er ikki tí at hondbóltssambandið er ónøgt við avrikið hjá føroyska landsliðsvenjaranum, at sáttmálin er strikaður, tí Eivind Jacobsen sigur, at HSF hevur verið væl nøgt við arbeiðið hjá Lars, og at danin hevur lagt lunnar undir nógvar ætlanir, ið føroyskur hondbóltur kann fáa gagn av í framtíðini.

Lars Nedergaard hevur millum annað lagt fram eina ætlan, ið hann nevnir »missión 2010«, har hann hevur lagt eina strategi fyri, hvussu hondbóltsfeløgini kring landið og HSF sjálvt skulu arbeiða fram ímóti einari støðugari menning av føroyska hondbóltinum.

Fara at lýsa í Føroyum

Formaðurin í HSF sigur, at hondbóltssambandið fer í næstum at lýsa eftir nýggjum landsliðsvenjara, og tað verður fyrst og fremst søkt í føroysku miðlunum. Eivind Jacobsen sigur, at tað er í flestum førum ov kostnaðarmikið at hava útlendskan venjara, og tí verður fyrst og fremst leitað her heima.

Tað hevur verið tungt fíggjarliga at hava manslandsliðið, sigur Eivind Jacobsen og leggur afturat, at HSF umhugsar, um tað er rætt at verða við í playoff kappingum hvørt ár. Hinvegin umhugsar HSF, um tað ikki er ein gongd leið at verða við í minni kappingum annaðhvørt ár, og so kanska play-off annaðhvørt ár. Hetta verður tó alt gjørt í samráð við komandi landsliðsvenjaranum og landsliðshópin, sigur formaðurin í HSF at enda. Vit royndu at fáa eina viðmerking frá Lars Nedergaard til tíðindini, men hann hevur ikki verið við at hitta seinastu dagarnar.



Hóast samstarvið nú steðgar, so eru tey í HSF fegin um tað arbeiðið, sum Lars Nedergaard hevur gróðursett

Tað tykist ganga niðurá hjá føroyska fótbóltslandsliðnum. Í øllum førum, um metast skal eftir styrkislistanum hjá FIFA

Føroyar og Palestina eru á sama báti

Tað gongur støðugt skeiva vegin hjá Føroyum á altjóða styrkislistanum, sum FIFA aftur kunngjørdi á summarmála

FÓTBÓLTSLANDS-LIÐIÐ
Jóannes Hansen

Tað gongur ikki skjótt, men kósin tykist vera greið. Á altjóða styrkislistanum, sum FIFA eina ferð um mánaðin roknar út, detta Føroyar eitt sindur aftur so at siga hvørja ferð. Síðsta dømið um hetta er listin, sum varð kunngjørdur mikudagin 14. apríl ella á summarmála. Nú eru Føroyar á 129. plássinum. Á listanum, sum varð kunngjørdur í mars, vóru Føroyar nummar 128. Á listanum, sum varð kunngjørdur í desember, vóru Føroyar nummar 126.

Tá ið Føroyar vóru hægst á listanum fyri nøkrum árum síðani, metti FIFA Føroyar at vera ímillum nummar 112 og 115.

Føroyar eru ikki einsamallar á 129. plássinum. FIFA hevur sett Føroyar undir liðina á Palestina, sum í altjóða fótbóltshøpi verður roknað at vera ein tjóð. Meðan Føroyar eru dotnar trý pláss skeiva vegin síðani undan jólum, hevur tað gingið hin vegin hjá Palestina. Teir hava lætt sær tíggju pláss hesar seinastu fýra mánaðirnar.

Frakland er næstbest

Heilt frammi í toppinum hevur ikki talan verið um serligar broytingar seinastu mánaðirnar. Brasilia verður framvegis mett at eiga besta fótbóltslandsliðið í heiminum. Frakland, sum Føroyar eru í HM undankappingarbólki saman við, verður mett at eiga næstbesta landsliðið í heiminum.

Allar hinar tjóðirnar, sum Føroyar skulu spæla ímóti í HM undankappingini, eru styrkismettar væl hægri enn Føroyar. Írland er á fimtanda plássinum, Sveis er nummar 45, Ísrael er nummar hálvt hundrað, og Kypros er nummar 97.

Millum Norðurlondini er Danmark styrkismett ovast. Danir eru nummar fjúrtan, Svøríki er nummar 21, Noreg nummar 38, Finnland nummar 42 og Ísland er á 60. plássinum.

Holland, sum Føroyar skulu spæla vinardyst ímóti 1. juni, eigur fimti besta landsliðið í heiminum.

Malta omanfyri Føroyar

Merkisvert er tað, at onkrar av tjóðunum, sum Føroyar hava staðið seg væl ímóti, nú verða styrkismettar hægri enn Føroyar. Her verður eitt nú hugsað um Malta, sum Føroyar fyri sjey árum síðani vunnu tvær ferðir 2–1 ímóti í HM undankapping. Malta er styrkismett sum nummar 128.

Seinnu árini hava Føroyar eisini vunnið ímóti Luksemborg, Liktinstein og Kasakstan. Allar hesar tjóðirnar eru niðanfyri Føroyar á listanum. Kasakstan er nummar 136. Liktinstein er nummar 149, og Luksemborg og Allan Simonsen eru dottin heilt aftur á 156. plássið.

Á listanum eru 204 tjóðir. Á aftasta plássinum er Montserrat, har høvuðsstaðurin eitur Plymouth. Karibiska oyggin, sum er 98 ferkilometrar við ella 3,1 ferkilometrar størri enn Borðoyggin, og har tað búgva tólv túsund fólk, eigur sambært FIFA veikasta fótbóltslandsliðið av øllum teimum 204 í heiminum.

Næsti styrkislistin hjá FIFA verður kunngjørdur 12. mai. Listin er grundaður á úrslit í undankappingum og á úrslit í vinardystum. Føroyar fara ikki at spæla landsdyst fyrrenn 1. juni. Møguleiki er kortini fyri, at Føroyar um ein mánað á styrkislistanum verða fluttar annan vegin ella hin. Fram ímóti EM endaspælinum, sum verður í Portugal í juni, eru nógvir vinardystir á skránni.

Vísa venjaranum álit

Hóast tað gongst illa at skava stig saman, so hevur Fremad Amager longt samstarvið við venjaran

ÚTISETAFELAG
Jóannes Hansen

Tað stendur einki serligt til í føroyska felagnum á Amager. Eftir páskaumfarið og 2-0 tapið á heimavølli ímóti Skjold er Fremad Amager niðanfyri strikuna. Tískil er setningurin hjá Hjalgrimi Elttør, Jann Inga Petersen, Andrew av Fløtum og øllum hinum í felagnum at stríðast fyri at varðveita plássið í næstbestu deildini.

Michele Guarini er venjari. Tá ið tað gongst illa og úrtøkan er soltin, plaga eyguni at verða vend ímóti venjaranum, og lættasta loysnin fyri at venda gongdini plagar at vera at siga venjaranum úr starvi.

Í hesi vikuni hevur Fremad Amager venjarin verið nógv umrøddur, men tað hevur ikki verið tí, at teir hava sagt ella ætla at siga honum úr starvi. Heldur er tað tvørturímóti. Í fyrradagin varð boðað frá, at felagið og venjarin hava skrivað undir nýggjan sáttmála. Samstarvsskeiðið skuldi verða liðugt í summar, men nú er skeiðið longt, soleiðis at Michele Guarini verður venjari í Fremad Amager í hvussu so er inntil á sumri í 2005.

Tá ið venjarin tók við starvinum í september í 2001, var Fremad Amager í botninum í 2. deild. Tað eydnaðist honum at venda gongdini, soleiðis at felagið slapp undan at flyta niður í Danmarksseriuna. Í fjør flutti Fremad Amager upp í næstbestu deildina. Leiðslan sigur, at tað var ikki minst venjaranum fyri at takka. Hóast tað gongst eitt sindur striltið at fóta sær í næstbestu deildini, so síggja teir onga orsøk at avskriva venjaran.

Michael Guarini, sum her sæst saman við Andrew av Fløtum, hevur júst skrivað undir nýggjan sáttmála við Fremad Amager